## Fáa íleggjarar

Borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurð Simonsen, væntar ikki, at partafelagið, sum skal gera tann ætlaða tunnilin millum Kambsdal og Skálabotn, fer at fáa trupulleikar við at fáa íleggjarar at fíggja verkætlanina. Tunnilin, sum kommunan ætlar at gera, verður 2300 metrar langur og er mettur at kosta 100 mió. krónur umframt vegir til teir báðar munnarnar. Í síðstu viku bað kommunan vinumálaráðið um loyvi til at gera tunnilin.

## Byggja út

Tey, sum eiga Hotel Streym, hava søkt Tórshavnar kommunu um loyvi til at byggja hotellið út. Hotellið, sum byrjaði sítt virksemi í fjør, hevur sum er 14 kømur. Men tað hevur víst seg at vera ov lítið, og tí er ætlanin at byggja uppí. Nýggi bygningurin verður átta ferðir tólv metrar í trimum hæddum. Tann niðasta hæddin verður til parkering, og í hinum báðum koma tólv kømur afturat. Útbyggingin er mett at fara at kosta fýra mió. krónur.

(Kelda: www.dimma.fo)

# Alfred samanber seg við Kára P. Højgaard

**Alfred Olsen er ikki partur av samgonguni, men er partur av valbólki samgongunnar og kennir seg tí ikki sum ein part av andstøðuni. Sjálvur heldur hann hetta minna um støðuna hjá Kára P. Højgaard**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Alfred Olsen*

- Viðurskiftini eru góð við samgonguna.

Tað sigur Alfred Olsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, hóast hann framvegis stendur fast við, at hann ikki er limur í somu samgongu.

Hann leggur dent á, at hann er limur í Sambandsflokkinum og atkvøður við honum, men í sonevndum etiskum málum stendur hann fríur.

*Men ert tú so formelt ikki samgongulimur, men reelt?*

- Eg havi meldað út, at eg ikki er ein partur av samgonguni, og hetta havi eg gjørt formelt klárt við at senda eitt tíðindaskriv út, sigur Alfred Olsen, og nevnir Kári P. Højgaard, tinglim Sjálvstýrisfloksins, ið ikki er partur av samgonguni, men er í valbólki við samgonguni.

- Støðan hjá Kára vísir, at tað ber til, sigur Alfred Olsen, ið vissar um, at hann er ein partur av tingarbeiðnum og hevur somu atgongd til nevndarsessir, sum Kári P. Højgaard hevur sum partur av valbólki samgongunnar.

### Hvørki í samgongu ella andstøðu

*Ert tú so við í valbólkinum hjá samgonguni?*

Ja, tað eri eg, sigur Alfred Olsen.

*Tú følir teg altso ikki sum ein part av andstøðuni?*

- Nei, eg føli meg ikki sum ein part av andstøðuni, sigur næstformaður Sambandsfloksins, ið enn sigur vera uttan fyri samgonguna.

Alfred Olsen sigur seg hava verið á nógvum fundum í seinastuni, og sigur ikki dáma, at fundarfólk verða órógvað av fartelefonum, og hetta er orsøkin til, at hann ikki hevur svarað Sosialinum fyrr enn í dag, hóast blaðið hevur roynt at fáa orðið á hann í eina viku.

Spurdur, um hann hevur frætt nakað frá løgmanni, ið áður hevur meldað út, at støðan hjá Alfred Olsen skuldi viðgerast í lítlu samgongu ínnan tingfundin í morgin, svarar Alfred Olsen noktandi.

- Nei, eg havi einki hoyrt um tað. Men vit hava demokrati, og løgmaður hevur rætt til at kalla inn til fund, um hann vil tað, staðfestir Alfred Olsen, ið framvegis hvørki er partur av andstøðu ella samgongu á tingi.

# Løgmaður: Bólturin liggur hjá Sambandsflokkinum

**Jóannes Eidesgaard er ikki longur so avgjørdur um at halda fund í lítlu samgongu um støðuna hjá Alfred Olsen Løgtinginum. – Tað verður ikki ein serskildur fundur um tað, sigur løgmaður, hóast hann áður hevur sagt seg vilja havt ein fund um Alfred Olsen. Jóannes Eidesgaard heldur útmeldingarnar frá Sambandsflokkinum vera misvísandi**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og samgonguleiðari, boðaði millum jólanna frá, at hann fór at krevja fund í lítlu samgongu um støðuna hjá Alfred Olsen í Løgtinginum.

Men nú tykist pípan at hava fingið annað ljóð.

- Eg havi nevnt fyri tær, at vit fóru at hava fund um málið.

- Men tað verður ikki ein serskildur fundur til tað. Eg royni at fylgja við útmeldingunum frá Sambandsflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard, ið leggur afturat, at hann heldur hesar útmeldingar hava verið misvísandi, sum hann orðar seg.



*Bólturin liggur hjá Sambandsflokkinum, sigur samgonguleiðarin um málið um Alfred Olsen, sum er uttan fyri samgonguna – og uttan fyri andstøðuna*

- Nú mugu vit síggja, hvat kemur frá Sambandsflokkinum.

### Bíðistøða

- Bólturin liggur hjá Sambandsflokkinum, og nú mugu teir gera leikin liðnan, sigur Jóannes Eidesgaard, ið sigur seg vera í "bíðipositión". Løgmaður sigur seg halda, at Alfred Olsen hevur róð fram undir, at hann ynskir at vera partur av samgonguni aftur.

Spurdur, um hann einki fer at gera, um Sambandsflokkurin vil varðveita núverandi støðu, har Alfred Olsen stendur uttan fyri samgonguna, svarar løgmaður, at tað ætlar hann ikki.

- Men fyribils liggur málið hjá Sambandsflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Nýggir mjólkarpakkar í dag




**Í dag broytist ein kendur partur av gerandisdegnum hjá okkum øllum, tí nú koma nýggir mjólkarpakkar á marknaðin við nýggjum litum og nýggjum nøvnum**

MJÓLK

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Pakkarnir verða vakurt bláir, reyðir, gulir og grønir og mynda eina snøgga eind, sum ger tað lætt at skilja ímillum ymsu mjólkina, bæði hjá børnum og vaksnum, sigur Mjólkarvirkið Búnaðarmanna í tíðindaskrivi.

Nøvnini verða Mjólk, Millummjólk, Lættimjólk og Soltimjólk, ið á greiðan og fólksligan hátt vísa til fitiinnihaldið í mjólkini.

- Við hesum er skapt ein snotilig og fullfíggjað heild fyri høvuðsvøruna hjá MBM. MBM er einasti mjólkarveitari í Føroyum og sær tað sum skyldu sína at fara væl um hesa heilsugóðu vøru, ið er so umráðandi fyri børn okkara og hvønn einstakan. Nýmótans dámurin skal styrkja um marknaðarstøðuna hjá mjólkini, so at hon eisini í framtíðini kann eiga sítt fasta pláss í húsarhaldinum, sigur mjólkarvirkið.

**Litirnir:**

3,0% er blá og eitur sjálvandi Mjólk sum áður
1,5% er reyð og eitur Millummjólk, áður hálvskúmað
0,5% er gul og eitur Lættimjólk sum áður
0,1% er grøn og eitur Soltimjólk, áður skúmað

Tað er Reproz, sum hevur staðið fyri sniðgávu og navngávu av nýggju mjólkarpakkunum.